# ítróttur

Nr. 125 • leygardagur • 5. juli 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo


**Sosialurin á Guernsey:**



*Ingrid Bjarnastein, blaðkvinna*



*Álvur Haraldsen, myndamaður*



*Jákup Mørk, blaðmaður*

Petur Petersen:

# Fleiri fólk, fleiri kappingar, fleiri krøv

**Petur Petersen, aðalstjóri í Mentamálaráðnum, ivast ikki í, at Føroyar einaferð um nøkur ár fer at vera vertsland fyri oyggjaleikunum aftur. Men um Føroyar fara at fáa ein so einastandandi ítróttar miðdepil sum Beau Sejour her á Guernsey, veit hann ikki rættiliga at siga**



*– Eg ivist ikki í, at vit kunnu fáa oyggjaleikirnar aftur til Føroya um nøkur ár. Men tað krevur nógv, og longri vit bíða, meira verður at fyriskipa og størri verða krøvini, sigur Petur Petersen*

OYGGJALEIKIR
*Álvur/Ingrid*

**Guernsey:** Millum mongu føroysku ferðafólkini her á Guernsey er aðalstjórin í Mentamálaráðnum, Petur Petersen. Vit hava tikið eitt prát við hann um oyggjaleikir og ítrótt.

– Eg ivist ikki í, at vit kunnu fáa oyggjaleikirnar aftur til Føroya um nøkur ár. Men tað krevur nógv, og longri vit bíða, meira verður at fyriskipa og størri verða krøvini, sigur Petur Petersen.

– Her hava tey gjørt nógv í sambandi við oyggjaleikirnar. Til dømis er tann stóri ítróttarmiðdepilin, Beau Sejour, umvældur fyri 90 milliónir pund, og tað er yvir 900 milliónir krónur.

– Tað er heldur ikki bara sum at siga tað, at fyriskipa ítrótt fyri yvir 2000 ítróttarfólk. Nógv sjálvboðið arbeiði skal til, og tað krevur ein ótrúligan stuðul frá tí lokala samfelagnum. Men tað er ikki ein ómøgulig uppgáva at fáa oyggjaleikirnar aftur til Føroya, heldur aðalstjórin.

### Størsta hending

Petur Petersen vísir á, at krøvini til allar kappingarnar gerast harðari og harðari, og longri tíð fer, hægri verða krøvini um Føroyar skulu skipa fyri oyggjaleikunum.

– Eisini Beau Sejour. Tað er lættari at hava ein ítróttarmiðdepil uppá handan mátan her, tá fólkið býr á einari oyggj og er savnað um St. Peter´s Port. Í Føroyum hevði tað verið verri, tí hvar skuldi ein slíkur miðdepil ligið?, spyr Petur Petersen.

– Nú er Vágoyggin bundin føst, og skjótt Norðoyggjar eisini, so eg haldi ikki, at tankin um ein ítróttarmiðdepil er utopiskur. Men tað er givið, at tað er dreymurin hjá einum og hvørjum oyggjasamfelag, at hava so góðar umstøður til ítrótt, sum tey hava við Beau Sejour. Oyggjaleikirnir eru eisini vorðnir til størstu ítróttarhending í Evropa í ár, so tað sigur rættiliga nógv.

Aðalstjórin heldur, at tað tekur góða konsentratión og ein má duga at síggja álvaran í uppgávuni.

Mentamálaráðið letur annars stuðul til ítróttaranlegg. Men fara oyggjaleikirnir nakrantíð at vera at síggja á løgtinsins fíggjarlóg?

– Onnur mugu taka stig til at fáa stuðul frá Mentamálaráðnum. Ítróttarfeløg ella lokal. Og um oyggjaleikir skulu fyriskipast, so eru tað nógv sum skal spæla væl saman. Kommunur, land og so víðari. Men eg eri ikki politikkari, so eg dugi ikki at svara uppá, um oyggjaleikirnir nakrantíð koma á fíggjarlógina.

Men kann man brúka ov nógvan pening uppá ítrótt og mentan?

– Um tú vilt hava eitt stutt svar, so er tað nei. Tað kann man ikki. Men tað er ikki nógvur peningur, sum Mentamálaráðið fær at luta út, og so verður alt lagt eftir, hvørji ítróttarlig, mentanarlig tiltøk og hvørjar byggingar eru á skránni, áðrenn pengarnir verða býttir út, sigur Petur Petersen.

– Nú hava vit eisini sett eina nevnd, sum skal gera eitt álit um ítrótt í Føroyum, tí vit hava mett, at ítróttin er so týdningarmikil og víttfevnandi, at hon skal hava eitt álit fyri seg.

Á oyggjaleikunum hevur aðalstjórin í Mentamálaráðnum annars gingið runt og hugt eftir ymsum ítróttargreinum.

– Harafturat havi eg roynt at fingið eitt sindur av mentanini við, og vitjað søvn og so víðari. Nú havi eg fingið eina nøkunlunda hóming av, hvussu tað er at skipa fyri oyggjaleikunum, men tað er verri enn so ikki fullfíggjað. Tað ber ikki til uppá so stutta tíð.

– Føroyar eru heldur ongin pinkutjóð í oyggjaleikahøpi, og endamálið við teimum má vera, at tú tekur lut og tú eisini skipar fyri. Oyggjaleikirnir koma aftur til Føroya, og teimum klára vit at skipa fyri. Tað er ongin grund til at halda seg aftur, tí tað gerst ikki lættari við at bíða, sigur Petur Petersen, aðalstjóri í Mentamálaráðnum at enda.





# Minst bronsa til Kjartan Eli

**Dublurnar hjá føroysku borðtennisspælarunum eru slignar út bæði hja kvinnum og monnum. Men Kjartan Eli Hentze hevur fingið í minsta lagi bronsu. Í gjár skuldi hann spæla hálvfinaluna, har hann skuldi finna útav, hvørjum slagi av metalli heiðursmerki skuldi verða gjørt av**

BORÐTENNIS
*Álvur/Ingrid*

**Guernsey:** Føroyski borðtennisspælarin, Kjartan Eli Hentze, hevur í øllum førum tryggjað sær eina bronsu í borðtennis fyri einstaklingar. Hann skuldi í gjár spæla hálvfinaluna, har tað saktans kundi farið báðar vegir, tí tann honum Kjartan Eli skuldi møta í hálvfinaluni, vann hann á í liðkappingini.



*Paula Eikhólm og Maria Nielsdóttir vóru hósdagin slignar út av dublukappingini. Tær taptu allar sínar dystir*



*Kjartan Eli Hentze og Petur Niclasen vóru í gjár slignir út av dublukappingini í einum tøttum dysti*

Dublurnar hjá føroysku borðtennisspælarunum eru báðar úti av kappingini.

Kjartan Eli Hentze og Peter Niclasen spældu taptu fjórðingsfinaluna 3-1.

– Tað var ein tættur dystur, sum kundi farið báðar vegir. Vit vistu áðrenn dystin, at tað fór at vera trupult, men marginalarnir vóru ikki við okkum hesaferð, segði Peter Niclasen eftir dystin.

Paula Eikhólm og Maria Nielsdóttir spældu eisini dublur hósdagin. Fýra dystir vóru á skránni, og taptu tær allar fýra við úrslitunum 3-1, 3-0, 3-2 og 3-1.

Hálvfinalan hjá Kjartan Eli var leikt fríggjadagin, men úrslitið megnaðu vit ikki at fáa við áðrenn evsta mark okkara. Men av tí, at tað ikki verður spælt um bronsuna í borðtennis, so er hon longu tryggjað honum.

Álit um ítrótt:

# Stór og spennandi uppgáva

**Nýggjasta skotið á stammuni innanfyri ítrótt og politikk er eitt álit um ítróttina í Føroyum. Mentamálaráðið hevur sett ein arbeiðsbólk, sum skal evna til eitt álit, sum skal verða klárt í februar 2004**

ÍTRÓTTUR
*Álvur/Ingrid*



*Arbeiðsbólkurin, sum er settur at gera eitt álit um ítrótt, avmyndað á Guernsey: F.v. Katrin Joensen, Johan Petur Hentze og Sølvi R. Hansen*

**Guernsey:** Mentamálaráðið hevur sett ein arbeiðsbólk, sum skal gera eitt álit um ítróttina í Føroyum. Hetta álitið skal vera klárt í februar 2004.

Mett verður, at ítróttin í Føroyum er so umfatandi og spennir seg so breitt, at tað er brúk fyri, at hon fær eitt serskilt álit.

Í arbeiðsbólkinum sita Katrin Joensen, forkvinna í Svimjisambandi Føroya, Sølvi R. Hansen, ítróttarráðgevi og formaður í sersambandi fyri frælsan ítrótt og Johan Petur Hentze frá Mentamálaráðnum.

– Eg fekk áheitina og arbeiðssetningin sendan næstan beint áðrenn vit fóru avstað. Tað er ein stór uppgáva, har útgangsstøðið verður tikið í verandi støðu, sum ítróttin er í í Føroyum, og eisini hvat vit vilja við ítróttini í framtíðini, sigur Katrin Joensen, sum er við í arbeiðsbólkinum.

– Hetta er spennandi, og tað er nógv at taka hond í og seta seg í, tí ítróttarøkið í Føroyum spennir so vítt. Tað verður spennandi at vita, hvat vit koma til, tí hetta er fyrsta ferðin, at ítróttin fær eitt serskilt álit.

Arbeiðsbólkurin hevur havt sín fyrsta fund her niðri á Guernsey, har tey hava tikið arbeiðssetningin ígjgønum og okkurt afturat.

– Tað fer at krevja nógv, og taka nakað av tíð. Eg havi sjálv ongantíð verið við í einum slíkum arbeiðsbólki fyrr, men frá ítróttini í Føroyum hevur tað verið eitt ynski, at vit fáa eina politiska útmelding. Sjálvandi er tað upp til landsstýrismannin, hvat hann ger aftaná álitið er liðugt, men vit ganga út frá, at politikkarnir koma við afturmeldingum, sigur Katrin Joensen.



*Longu í triðju royndini tveitti Heri klingruna út á 45,28 metrar, og hetta var tað eingin, sum kundi gera honum eftir*

# Gullið kom aftur

**Eftir bronsumerki á seinastu oyggjaleikum vann Heri Ziska gull í klingruvarpi hósdagin, tá hann tveitti klingruna 45,28 metrar**

KLINGRUVARP
*Álvur/Jákup*

**Guernsey:** Fjóðra føroyska gullmerkið á oyggjaleikunum gjørdist veruleiki, tá Heri Ziska hóskvøldið tók lut í klingruvarpi.

Undan hesum hevði Heri sagt, at um nýggi kastiteknikkurin hjá honum riggaði, so roknaði hann við gullinum, og hetta kom eisini at halda. Longu í triðja umfarinum, tá allir kastararnir framvegis vóru við, tveitti Heri klingruna 45,28 metrar, og hesum rakk eingin av hinum sjey, sum síðani royndu seg í sjálvum finaluumfarinum. Næst við var ein kastari av Rhodos, men tá hann í sætti royndini bert kom á 44,07 var eisini hann úti av kappingini.

### Helt lyftið

Heri segði eisini undan kappingini, at hann vanliga kastar sítt besta kast á árinum á oyggjaleikunum, so soleiðis varð eisini hesaferð.

- Eg haldi sjálvur, at hetta var mítt besta kast síðani 1999, so hetta er nógv besta kastið í longri tíð.

Og teknikkurin riggaði eisini væl. Hevur tú gjørt eyka nógv við tann partin av venjingini seinastu tveir dagarnar?

- Nei. Eg var og kastaði eitt sindur fyrradagin, men annars hevur tað fyri tað mesta verið mental venjing, so eg var klárur í høvdinum í dag. Tað hevur minst líka stóran týdning.

Og tað tóktist heldur ikki at nerva teg í seinasta kastinum, at tú longu hevði vunnið. Hevði tað lættasta ikki bara at fara jublandi út og so bara tveitt klingruna onkrastaðni.

- Nei. Slíkt dugi eg slettis ikki. Arbeiðið skal gerast liðugt, somikið einfalt er tað, segði Heri at enda, áðrenn hann fór eftir gávuni, sum hann hevði lovað dóttrini undan fráferðini til oyggjaleikir.

- Eg segði við hana, at eg fór at koma heim við einum gullmerki, so tað er gott, at mann onkun tíð kann halda tey lyfti, sum eru givin, segði ein brosandi gullvinnari at enda.